# 2007 í myndum



*Eiðis Ljómfelag spældi til setanina. Millum sangirnar, tey førdu fram var tann í Sundalagnum so vældámdi "Vit skora mál", sum er ein av slagsangunum hjá EB/Streymi*



*Jana Mouritsen, bygdaráðslimur, setti Sundalagsstevnuna. Røðuna helt hon uttanfyri gamla skúlan í Hvalvík*



*Fitt av fólki í øllum aldri var savnað uttanfyri gamla skúlan, har Sundalagsstevnan varð sett fríggjakvøldið*



*Eitt øðrvísi, men spennandi tiltak til børnini var, tá lokala sløkkiliðið setti eld á ein bil og síðani sløkti hann*



*Jana Mouritsen, bygdarráðslimur, og Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, í stevnupráti. Lagið mundi vera gott eftir trygga sigurin á KÍ*



*Børnini vóru ógvuliga upptikin av arbeiðinum hjá sløkkiliðsmonnunum. Her vísir ein teirra saksin fram, sum teir brúka at klippa bilar sundur við*